**Starv**

# Ferðslusamskipari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum ferðslusamskipara til fólkaflutningsdeildina, t.e. Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.
Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- akstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá ferðslusamskiparanum**
Høvuðsuppgávan hjá ferðslusamskiparanum verður at tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av dagliga fólkaflutninginum innan Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir.

Uppgávurnar hjá ferðslusamskiparanum verða m.a.:

- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagliga fólkaflutninginum
- Fyrisita koyri- og vaktarskipanir
- Eftirlit við koyrisáttmálum
- Fyriskipa bíleggingar
- Gera flutningsavtalur
- Verða við í arbeiðinum at gera ferðaætlan
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Førleikakrøv**

- Útbúgving innan ferðslustýring e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Góðan kunnleika og royndir innan edv á brúkarastøði
- Kunnleiki til formlig krøv innan rakstur av ferðamannaskipum og akførum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har ferðslusamskiparin skal vera við til at víðari menna hesa funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Vakt eftir vanliga arbeiðstíð.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvskjølum skal sendast til:

***ran ara k an n***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 1. august 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Poul Jákup Thomsen,

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

Toll- og Skattstova Føroya
Sandoyar Øki

# Starv á Toll- og Skattstovu Føroya,

## Sandoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Sandoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur:** Álíkningar- / eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiði er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir. Í ivamálum hevur hann beinleiðis tilvísing til deildirnar í Stýrinum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttanfyri stovnin eitt nú á Handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Eisini er ynskiligt, men tó ongin treyt at viðkomandi býr í Sandoynni.

**Vit kunnu bjóða** eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið kann** fáast við at seta seg í samband við Randi Røsvik, deildarstjóri á tlf. 352600, lokal 2621

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið Postboks 2151, Traðargøta 39, FO 165 Argir **innan 13. august 2000.**

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, íð eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Sandoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 2 fólk og 1 næmingur.

Til handlarnar við Hoyvíksvegin og Gripsvegin verður søkt eftir fyrikomandi

# Ekspeditrisu

Arbeiðið fevnir um skiftandi vaktir uml. 30 tímar um vikuna.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Andreu.

BAKARÍIÐ
P/F HJÁ GUNLEIVI
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61

# Summarfrí

Bilverkstaðið er stongt vegna feriu frá 16. juli til 30. juli.

Bilasølan og eykalutagoymslan eru tó opin sum vanligt.

**Daewoo í Føroyum**
**P/F Esmar Simonsen**
Kambsdalur
Tlf. 444405

Sosialurin -har tað hendir

Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn

# Frá Tvøroyrar kommunu

Gjørt verður vart við, at svimjihylurin eisini er opin alt summarið.

Opið er soleiðis:

| | |
|---|---|
| Týsdag | kl. 16 til 20 |
| Tórsdag | kl. 16 til 20 |
| Leygardag | kl. 13 til 18 |

Sosialurin -har tað hendir

**Mentamálastýrið**

# Summarfrí

Í summar eru okkara avgreiðslutíðir broyttar soleiðis:

Frá mánadegnum 16. juli til fríggjadagin 20. juli er telefonavgreiðslan opin soleiðis: Opið er frá kl. 10.00 til 12.00 og frá kl.13.00 til 15.00

Frá mánadegnum 23. juli til fríggjadagin 3. august er stongt.

Mánadagin 6. august er móttøkan opin aftur sum vanligt, tó er telefonavgreiðslan stytt soleiðis: opið frá kl.10.00 og 12.00 og frá kl.13.00 til 15.00 fram til 10. august.

**Mentamálastýrið**

# Sernámsdepilin

## Sálarfrøðingur

Fyri sálarfrøðing í farloyvi sóknast vit eftir avloysara at røkja starvið frá 1. oktober 2001 til 31. juli 2002.

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálastýrinum, sum umframt at umsita og menna sernámsfrøðiliga virksemið í undirvísingarverkinum, eisini skipar fyri og ráðgevur í sambandi við allar sernámsfrøðiligar spurningar og veitir tænastur til børn og ung í aldrinum 0–18 ár.

Tann, ið settur verður, skal fyrst og fremst taka sær av ráðgeving/ vegleiðing av foreldrum, lærarum, pedagogum og øðrum fakfólkum og av kanning/ viðgerð av børnum og ungum.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**

- Cand. psyk/ cand. ped. psyk. - ella samsvarandi. Lesandi, ið væntandi fáa prógv í næstum, kunnu eisini søkja starvið.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við klinískt-psykologiskum og pedagogiskt-psykologiskum uppgávum.
- Tala føroyskt.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Sernámsdepilin,**
**Frælsið 32,**
**Postrúm 2036,**
**FO-165 Argir**

og vera okkum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 28. juli 2001.**

Nærri um starvið fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, Sernámsdepilin, tlf. 314522, heima 314919.

# Fiskivinnuroyndir

**Lýst verður eftir verkætlanum at menna virking og sølu av vørum burtur úr upsa**

Á játtanini til Fiskivinnuroyndir 2001 er peningur (1,0 mió. kr.) ætlaðar til verkætlanir at menna virkingarhættir og sølu av vørum virkaðum burtur úr upsa. Játtanin er ætlað sum trý-ára átak.

Áhugað (fyritøkur, stovnar ella einstaklingar), sum hava ætlanir ella hugskot um, hvussu meira kann fæst burtur úr upsatilfeinginum við mentum virkingarhættum og sølu av vørum úr upsa, og sum tørva stuðul til fremjan av ætlanini, verða við hesum boðin at søkja um stuðul av givnu játtanini.

Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar av stýringsbólki, sum mótvegis Fiskimálastýrinum skal tryggja, at stuðlaðar verkætlanir eru á høgum fakligum støði og eru til frama fyri vinnuna sum heild. Stýringsbólkurin fer at leggja dent á, at verkætlanir byggja upp kunnleika um marknað og sølu við serligum atliti at vørum úr upsa ella byggja á slíkan kunnleika.

Umsóknir verða latnar Menningarstovuni, sum fyribils hevur leiðsluna av stýringsbólkinum. Umsóknir verða skrivaðar á umsóknarblaði saman við teimum eyka skjølum og viðmerkingum, sum umsøkjari heldur tørva at lýsa verkætlanina nóg væl. Umsóknarblað fæst við at venda sær til Menningarstovuna. Umsóknarfreistin er 1. august 2001.

**Menningarstovan**
Postrúm 259
110 Tórshavn
Tlf. 31 30 28
Fax 31 04 59
e-postur: kjkr@trade.fo

# Kaðalmontørur til Føroya Tele í Kollafirði

*"Skifta vit ikki kós, enda vit helst har, vit stýra!"*
*Kinesiskt orðatak*



Søkt verður eftir kaðalmontøri til Føroya Tele í Kollafirði at byrja 1. september 2001 ella skjótast gjørligt. Á Føroya Tele í Kollafirði starvast íalt 6 fólk. Fólkið søkt verður eftir, skal í stóran mun arbeiða við nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum.

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:**

- nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum
- vekslarar og teleterminalar
- internet og ISDN
- vanliga telefonútgerð
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- skráseting av kaðalneti
- at ráðgeva viðskiftafólk um felagaútgerð og tænastur
- annað fyrifallandi

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Elektronikmekkanikari, elektrikari og/ella hollar viðkomandi royndir.

Arbeitt verður í Norðurstreymoy og Norðureysturoy. Uppmøtingarstaður er hjá Føroya Tele í Kollafirði.

Starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða opin, duga væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk. Eisini vænta vit EDV-førleika á brúkarastøði.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Andreasen, økisleiðari tel. 421000 ella Starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 20. juli 2001

Umsóknir skulu sendast til
**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*